# Nýggjur barnagarður á Kambsdali næsta summar

**Í Fuglafjarða kommununu verður roknað við, at tað verður klárt at bjóða barnagarðin á Kambsdali út í mai, og at barnagarðurin verður klárur at taka í nýtslu á sumri í 2008**

BARNAANSING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Bíðilistin í Fuglafirði skal fáast heilt burtur, sigur formaðurin í sosialu nevnd í Fuglafirði*

Gongst sum ætlað, so verður nýggjur barnagarður liðugur at taka í nýtslu á Kambsdali 1. august í 2008.

Fuglø arkitektar í Klaksvík sita við uppgávuni at tekna og rokna. Í mai mánaði er ætlanin, at teir skulu vera liðnir. So verður arbeiðið boðið út, og tað verður lagt upp til, at barnagarðurin skal verða liðugur at taka í nýtslu eitt stórt ár eftir, at tað verður farið undir byggingina.

Barnagarðurin verður bygdur í nánd av skótahúsinum á Kambsdali. Talan verður um 700 fermetra stóran bygning. Stovnurin verður bygdur til 74 børn í tveimum stovum til vøggustovubørn og trimum stovum til barnagarðsbørn. Hetta er sama barnatalið, sum er í Dagstovninum, sum Fuglafjarðar kommuna eigur inni í Fuglafirði.

Fuglafjarðar kommuna eigur økið, har nýggi barnagarðurin skal byggjast.

## Eingin skal bíða

Í løtuni eru 64 á bíðilista at sleppa í ansingarstovn í Fuglafirði. 34 av hesum ganga í dagrøkt. Foreldrini hjá hesum børnum hava givið til kennar, at tey heldur vilja hava børnini í barnagarð enn, at tey skulu vera í dagrøktini, sum annars hevur riggað og riggar væl í Fuglafirði.

- Vit hava staðfest gongdina, sum er, at foreldur heldur vilja hava børnini í stovn enn í dagrøkt. Tí byggja vit ein barnagarð afturat. Málið hjá okkum er, at eingin bíðilisti skal vera til barnaansing í Fuglafjarðar kommunu. Tá ið ynski verður um ansing, skal tað altíð bera til at fáa barnið í dagrøkt. Í nýmótans samfelagnum eigur barnaansing saman við tøkum grunddøkjum, góðum skúla og frítíðarskúla at vera eitt sjálvsagt tilboð, sum kommunan til eina og hvørja tíð skal syrgja fyri, heldur Eyðun á Lakjuni, sum er formaður í sosialu nevnd í Fugjafjarðar býráð.

Býráðið í Fuglafirði hevur valt bygginevnd, sum fyri býráðið skal taka sær av byggingini av nýggum barnagarði. Í nevndini eru Eyðun á Lakjuni, sum er formaður, Pætur Joensen, býarverkfrøðingur, Julianna Næs, leiðari í dagstovninum í Fuglafirði, Irena Olsen, leiðari í sosialu deild hjá Fuglafjarðar kommunu og Sigurd S. Simonsen, borgarstjóri.

Kostnaðurin fyri nýggja barnagarðin ætlast at verða 12 milliónir krónur. Býráðið gjørdi fyri einum ári síðani av, at tað skuldi farast undir nýggjan barnagarð. Á fíggjarætlanini fyri 2007 eru fýra milliónir settar av til barnagarðin. Restin verður fíggjað í 2008.

## Menning

Á Kambsdali eru umleið 40 hús, og har búgva umleið 180 fólk. Nýggj sethús stinga seg støðugt upp á dalinum. Fólkatalið kvinkar uppeftir í Fuglafjarðar kommunu. Á nýggjárinum búðu 1585 fólk í kommununi. Á nýggjárinum 2006 var fólkatalið 1559 fólk í kommununi.

- Øll børn í kommununi – uttan mun til hvar tey búgva – fara at hava møguleika at sleppa í stovnin á Kambsdali, har vit rokna við stórum vøkstri og menning. Har er ídnaðarøki, og har eru fleiri miðnámsskúlar. Fyrispurningar eru støðugt eftir økjum at byggja sethús og vinnubygningar á. Kommunan hevur fyri stuttum søkt landsmyndugleikan um loyvi at fara undir tunnil millum Kambsdal og Skálabotn. So talan er og verður um sentralt øki, har vit nú fara undir at byggja nýggjan barnagarð, sigur Eyðun á Lakjuni, formaður í sosialu nevnd í Fuglafjarðar býráð.

# Húsarhaldsskúli Føroya

**Lagt til rættis:**
*Manja Johansen og Anna Rødgaard*

**Mynd:**
*Jens K. Vang*

**Síðan Húsarhaldsskúlin í Klaksvík lat upp í 1974, hevur skúlin havt sera stóra undirtøku, serliga millum gentur í aldrinum 16 til 21 ár.**

Skúlin tekur ímóti 21 næmingum á hvørjum ári, bæði gentum og dreingjum. Altíð er langur bíðilisti, og tí skal man søkja í góðari tíð. Skúlaárið byrjar í august mánað og er sjey mánaðir fram. Á skúlanum búgva tey í tveymanskømrum. Har er felags vesi og brúsur, køkur, stova, seymirúm og fitness rúm. Skúlin leggur stóran dent á húsarbeiði, tað sosiala og heilsuráðgeving.

Vit vóru og vitjaði á skúlanum, tá tey høvdu eina endaliga framsýning av øllum, tey høvdu gjørt gjøgnum skúlaárið. Har fingu vit eitt prát við Johannu á Tjaldraflotti, ið er leiðari á skúlanum. Hon greiddi frá, at tað altíð vóru nógv fólk til framsýningarnar. Í fjør vóru umleið 200 fólk, og í ár væntar hon fleiri fólk, nú undirsjóvartunnilin er komin. Øll eru hjartaliga vælkomin, og um nakar er áhugaður, eru tey vælkomin at keypa, tað ið næmingarnir hava gjørt.

Johanna heldur, at hetta er ein góður og mennandi skúli fyri ungdómin, har tey sleppa at brúka sítt hugflog og sín kreativitet. Hon er ógvuliga ovfarin av, hvussu dugnalig tey eru. Tá ið skúlaárið endar í februar mánað, hava tey skeið fyri øllum, har tey undirvísa í ymiskum ítrivi, inntil skúlin byrjar aftur í august. Eisini her er sera góð undirtøka. Sjálv undirvísir Johanna í matgerð og heilsuráðgeving.

## Prát við næmingar

Síðani fingu vit eitt prát við Ann Hansen 17 ár úr Porkeri, og Mariu Højgaard 16 ár av Toftum. Tær ganga báðar á skúlanum.

Hvussu gongur ein dagligdagur hjá tykkum fyri seg?

- Vit eru deild upp í tvey hold, har eitt ger mat og hitt hondarbeiði. Soleiðis skifta vit aðruhvørja viku.

Nær fara tit upp og hvussu longi er skúlagongdin hvønn dag?

- Vit fara upp kl. 8.00. So syngja vit morgunsang, síðani fara vit í gongd við at gera mat, gera reint, seyma, og av og á hava vit fitness/ arobic tímar, brandroyndir, fystihjálparroyndir og trygdarskeið. Skúlagongdin endar umleið kl. 16.00.

*Hvat gera tit so aftaná skúlatíð?*

- Har gera vit tað, vit hava hug til: fara út ein túr, hyggja at sjónvarp, spæla spøl, eru á arto og líknandi.

*Hvat dáma tykkum best við skúlanum?*

- Tað stuttligasta er, tá vit hava temadag, har vit gera mat, klæðir og pynt frá øðrum londum, fyri at síggja, hvussu teirra mentan er.

*Hvørji lond hava tit havt um?*

- Hawaii, Kina, India, Mexico og Føroyar. Eisini gjørdu vit nógv burturúr føstulávint og valentine í ár.

*Dugdu tit at gera mat og seyma, áðrenn tit komu her?*

- Nei, slett ikki líka nógv, sum vit gera í dag. Vit hava lært ógvuliga nógv, og halda tað er sera áhugavert.

*Hvat serligt hava tit lært?*

- Vit hava lært nógv. Eitt nú at binda slipsaknút, sigur Maria við einum smíli.

*Er hetta nakað tit kunnu viðmæla øðrum ungum?*

- Ja, heilt sikkurt! siga Maria og Ann avgjørdar til endans.



*Johnva Joensen 17 ár klaksvík, Anita Højgaard 17 ár Fuglafjørður, Maria Højgaard 16 ár Toftir, Kirtin Khaliqhey 17 ár Miðvágur, Jenny Olsen 17 ár Toftir, Ann Hansen 17 ár Porkeri, Jana Maria Eliasen 17 ár Syðradalur.*